# Elfelagið SEV og Kommunufelagið

## Til Rættarnevndina – viðmerkingar til løgtingsmál 112/2018

Frágreiðingini í løgtingssamtykt 75/2018 skal fáast til vega fyrst
Vandi fyri hækkandi elprísi
Ein støðug elskipan er grundleggjandi fyritreyt
Trygg tilgongd og pumpuskipan
Prísstýring loysir ikki allar trupulleikar
Brúkarin gloymdur
Netfelagið viknar
Uppskotið elvir til ótrygg fíggjarviðurskifti
Nógvir ósvaraðir spurningar
Vantandi skjalprógv
Grundleggjandi samfelagslig broyting

Tórshavn 29. mars 2019

**Til Rættarnevnd Føroya Løgtings.**

Viðvíkjandi løgtingsmáli 112/2018 um at liberalisera elorkuøkið loyva SEV og Kommunufelagið sær innleiðandi at vísa á, at uppskotið fyrst og fremst leggur dent á framleiðslupartin, sum er áhugaverdur fyri ávís vinnulívsfólk og fyritøkur, og har gongd longu er á trimum vindútboðum. Hinvegin leggur uppskotið lítlan dent á vantandi grønar elloysnir til brúkararnar, har veruligur tørvur er at skapa betri umstøður.

Elfelagið SEV og Kommunufelagið eru ónøgd við, at eitt uppskot, ið inniheldur djúptøknar broytingar á elorkuøkinum, sum er grundarlagið undir øllum samfelagnum, ikki kemur frá landsstýriskvinnuni, sum varðar av økinum. Samfelagið hevur krav uppá, at eitt uppskot av hesum slagnum er væl fyrireikað av Heilsu- og innlendismálaráðnum í samráði við SEV og kommunurnar, áðrenn tað verður borið í løgtingið.

Eisini loyva SEV og Kommunufelagið sær at vísa á, hvat er farið fram á elorkuøkinum, sum kann vera viðkomandi at hava í huga í umrøðuni av uppskotinum, sum Magni Laksáfoss, løgtingsmaður, hevur lagt fyri løgtingið.

Elfelagið SEV og Kommunufelagið vilja boða Rættarnevndini frá, at feløgini taka undir við álitinum í uppskoti til samtyktar, løgtingsmál nr. 75/2018, sum var samtykt í løgtinginum 6. mars 2019 við 27 atkvøðum fyri og einari atkvøðu ímóti, har løgtingið heitti á landsstýrið um at gera eina frágreiðing um elorkuøkið.

SEV vil fyri Rættarnevndini staðfesta, at SEV er sinnað at vera til taks í kanningararbeiðinum, og at SEV sostatt vil luttaka opið og jaliga, alt eftir hvør tørvurin verður hjá teimum, sum skulu greiða frágreiðingina úr hondum.

SEV hevur leingi ynskt eina kanning av elorkuøkinum, sum javnt og samt hevur verið partur av almenna orðaskiftinum seinnu árini. Tí valdi SEV í fyrstu atløgu at biðja Dansk Energi gera eina kanning av hesum viðurskiftum. Kanningin nevnist "Notat – Funktionel adskillelse af elsystemet på Færøerne", og hon var alment løgd fram í februar 2019.

SEV og Kommunufelagið fegnast eisini um "Orkupolitisku ætlanina – hvussu vit røkka málunum fram til 2025 og 2030", sum Heilsu- og innlendismálaráðið legði alment fram í juni 2018.

SEV og Kommunufelagið taka undir við kapping á elorkuøkinum, har kapping gevur meining, og feløgini taka eisini undir við skilagóðum broytingum, sum seta ferð á grønu kósina fyri at røkka málinum "100by2030" tryggast, bíligast og grønast – brúkaranum og vinnulívinum at gagni.

**Ítøkiligar viðmerkingar til uppskotið, løgtingsmál 112/2018**

Við støði í grundgevingunum niðanfyri mæla SEV og Kommunufelagið løgtinginum til at bíða við at taka støðu til uppskotið frá Magna Laksáfoss, løgtingsmanni.

- **Almenn kanning er fyrsta stigið**
  Vísandi til løgtingssamtyktina um at kanna elorkuøkið nærri, vísandi til omanfyri nevndu "Orkupolitisku ætlanina" og vísandi til "Notat – Funktionel adskillelse af elsystemet på Færøerne", so er skilabest at bíða við hesi viðgerðini av umfatandi broytingum í elveitingarlógini, til landsstýrið hevur gjørt eina endaliga frágreiðing av hesum viðurskiftum sambært løgtingssamtyktini frá 6. mars 2019.

- **Vandi fyri hækkandi elprísi**
  Omanfyri nevnda kanning hjá Dansk Energi vísir, at ein liberalisering við einari marknaðarskipan hevur við sær, at elprísurin hækkar 9-15 oyru/kWt uttan MVG, sí síðu 14 í "Notat – Funktionel adskillelse af elsystemet på Færøerne". Ein hækkandi elprísur kann bremsa ferðini á grønu kósini.

- **Ein støðug elskipan er grundleggjandi fortreyt**
  Meira ferð fæst ikki á grøna framleiðslupartin við at skipa ein frían elmarknað. Fyrst og fremst skal talan verða um eina støðuga elskipan, sum skal byggjast varliga út, so at javnvágin og støðufestið í elskipanini alla tíðina eru í tryggum kørmum sambært teimum fysisku lógum, sum eru galdandi innan elmegi. Tí ber ikki til at fylla elskipanina út í einum taki við óstøðugum orkukeldum sum vindi og sól. Tó er vert at nevna, at tað í roynd og veru ongantíð hevur verið so nógv ferð á útbyggingunum í grøna framleiðslupartinum sum beint nú, har vindorkumátturin skal økjast úr 18 MW upp í 60 MW við verandi trimum útboðum, sum eru sett í verk. Tað er gott og væl ein trífalding av vindorkumáttinum í Føroyum.

- **Trygg tilgongd og pumpuskipan**
  Neyðugt er áhaldandi við einari skipaðari tilgongd, har kjarnin í elskipanini tryggjar eina støðuga javnvág í elveitingini, sum í framtíðar skipanini fæst frá vatnorkuni saman við einari pumpuskipan í Vestmanna. Tað er alneyðugt, at henda pumpuskipanin kemur í rakstur innan fá ár, tí annars verður vantandi pumpuskipanin ein fløskuhálsur á grønu kósini. SEV læt orkumyndugleikanum umsókn um pumpuskipan 31. august 2018.

- **Prísstýring loysir ikki allar trupulleikar**
  Uppskotið, 112/2018, hevur sum fyritreyt, at brúkarin fer at rætta sína nýtslu eftir grønu elframleiðsluni. Henda fyritreytin heldur ikki í veruleikanum, tí brúkarin krevur elorku, júst tá hann hevur brúk fyri henni. Allar størsti parturin av elnýtsluni er "her og nú nýtsla". T.v.s. at tað einhvørja tíð verður elframleiðslan, sum skal nøkta eftirspurningin frá brúkaranum. Bert smærri partar av elnýtslumynstrinum kunnu væntast at broytast við prísstýring, t.d. løðing av elbilum um náttina.

- **Brúkarin gloymdur**
  Ásannandi, at ferðin á grønu kósini veldst um, hvussu brúkarin verður stimbraður at taka undir við grønum loysnum, so má staðfestast, at lítlar og ongar loysnir eru í uppskotinum, sum skulu fáa brúkaran at velja grønar orkuloysnir. Við øðrum orðum leggur uppskotið dent á framleiðslupartin, har gongd longu er á vindútboðum, og uppskotið leggur lítlan dent á umstøðurnar hjá brúkarunum, har tað, sum áður nevnt, veruliga er stórur tørvur at skapa betri umstøður.

- **Netfelagið viknar**
  Sambært uppskotinum skulu veitingartrygdin og elgóðskan tryggjast við avtalum millum netfelagið, framleiðarar og sølufeløg. Vandin í hesum partinum av uppskotinum er, at máað verður burtur av virkisførinum hjá netfelagnum, tí at ábyrgdin og virkisførið hjá netfelagnum verða tá beinleiðis heft at avtalum við framleiðarar og sølufeløg. T.v.s. at vandi er fyri, at henda ábyrgdin, sum í dag liggur trygt í einari eind, verður spjødd sundur á einum veikari grundarlagi, tí avtalupartarnir verða fleiri og smærri. Harvið verður sterka eindin til fleiri veik lið, sum hvør sær ikki hava beinleiðis ábyrgd, men sum kunnu fáa stóra ávirkan á ábyrgdargrundarlagið hjá netfelagnum mótvegis samfelagnum og brúkaranum. Við øðrum orðum verður ikki nóg góður samanhangur millum virkisførið, avgerðarrættin og ábyrgdina hjá netfelagnum.

- **Uppskotið elvir til ótrygg fíggjarviðurskifti**
  Sum uppskotið er orðað, verður framleiðslan spjødd millum fleiri smærri eindir, har eitt loft á ein triðing verður sett á, hvussu stóran part av føroysku elframleiðsluni ein einstakur framleiðari kann eiga. Hesi viðurskifti kunnu saman við einum fríum elmarknaði skapa ótrygg fíggjarviðurskifti hjá tí einstaka framleiðslufelagnum, tí Føroyar eru í heimshøpi eitt ógvuliga lítið og avbyrgt elorkuøki, sum sambært uppskotinum verður liðað sundur í upp aftur fleiri smærri eindir, ið kunnu elva til vantandi álit frá fíggjarveitarum. Hetta elvir ofta til verri lánstreytir, sum sannlíkt hækka elprísin og í ringasta fall minka ferðina á grønu kósini.

SEV og Kommunufelagið hava í hesum umfarinum ikki fleiri beinleiðis viðmerkingar til uppskotið hjá Magna Laksáfoss, løgtingsmanni, men feløgini bæði meta tað vera viðkomandi at spyrja, hví elskipanin skal broytast? Verður elprísurin lægri? Verður skipanin í uppskotinum betri enn verandi skipan? Verður hon tryggari? Verður hon lættari at umsita? Fáa vit sum heild eina skipan, sum er betri enn tann elskipan, vit hava í dag? Fer tað at ganga skjótari á grønu kósini, og hvør er grundgevingini fyri tí?

Samanumtakandi ber til at spyrja, hví skulu vit broyta elveitingarlógina í skundi, tá kapping longu er møgulig í framleiðslupartinum og við heildarloysnum úti hjá brúkarunum? Hví skulu vit broyta lógina í skundi, tá smáverk longu hava atgongd til elnetið? Hví skulu vit fremja eina lógarbroyting í skundi, tá vit hava eina sterka kjarnuveiting í elskipanini?

Havandi í huga at elveitingin er grundarlagið undir øllum samfelagnum, og at talan ikki bert er um okkurt hissini øki, sum skal broytast, so krevja hesir og aðrir viðkomandi spurningar grundgivin og

skjalprógvað svar, ið vónandi fáast til vega í einari almennari frágreiðing um elorkuøkið sambært løgtingssamtyktini, løgtingsmál nr. 75/2018, áðrenn endalig politisk støða verður tikin til, hvussu elorkuøkið í Føroyum skal skipast frameftir.

Vinaliga

**Elfelagið SEV**
**Landavegur 92**
**FO-110 Tórshavn**

John Zachariassen, nevndarformaður

Hákun Djurhuus, stjóri

**Kommunufelagið**
**R. C. Efffersøesgøta 26**
**FO-110 Tórshavn**

Dennis Holm, nevndarformaður

Eyðun Christiansen, stjóri

***Hjálagt hesum skjali:***

*"Notat – Funktionel adskillelse af elsystemet på Færoerne"*
*"Orkupolitisk ætlan – hvussu vit rokka málunum fram til 2025 og 2030"*